Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Liljan Weihe, løgtingskvinna

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum

Evni: Fíggjarstøðan hjá lág- og miðalløntum

Spurningar:

1. Hvussu sær fíggjarstøðan út hjá einum støkum arbeiðara í Tórshavn við trimum børnum, sum hevur eina mánaðarløn uppá 20.000 kr.?
2. Hvussu sær fíggjarstøðan út hjá einum støkum lærara í Tórshavn við trimum børnum, sum hevur eina mánaðarløn á 38.524 kr.?
3. Hvussu sær fíggjarstøðan út hjá einum støkum løgtingsfólki í Tórshavn við trimum børnum, sum hevur eina mánaðarløn á 42.875 kr.?
4. Hvørjar almannaveitingar, hjálparpakkar v.m. hava hesir bólkar rætt til? Og hvørjar eru upphæddirnar?

Viðmerkingar:
Tað er ongin ivi um, at inflatión og rentuhækkingar raka føroysku húskini – summi meira meint enn onnur. Hesum hava bæði undanfarna og verandi samgonga roynt at bast við oljuískoyti, hjálparískoyti, lønarlyftum, lønarhækkingum og skattalætta til lág- og miðalløns.

Tað er tó nakað av iva um, hvussu fíggjarliga støðan er og ikki minst verður hjá ávísum bólkum í samfelagnum. Fyri at fáa greiðu á hesum og harvið eisini kunna hjálpa teimum, ið veruliga tørva hjálp, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 14. desember 2023

Liljan Weihe